# Uttanríkis- og vinnumálaráðið

**Løgtingið**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 5. mars 2019 |
| Mál nr.: | 19/00057 |
| Málsviðgjørt: | SPS |
| Eftirkannað: | 20. februar 2019 |

**Løgtingsmál nr. 146/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (Vinnufelagalógin), løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg og løgtingslóg um broyting í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om visse erhvervsdrivende virksomheder (Vinnufyritøkulógin)** (Striking av handahavapartabrøvum og tøkniligar rættingar**)**

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (Vinnufelagalógin), løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg og løgtingslóg um broyting í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om visse erhvervsdrivende virksomheder (Vinnufyritøkulógin)**
(Striking av handahavapartabrøvum og tøkniligar rættingar)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 73 frá 31. mai 2011 um parta- og smápartafeløg (Vinnufelagalógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 48, stk. 2, 3. pkt. verður strikað.

**2.** Í § 49 verða sum stk. 2 - 4 sett:
"*Stk. 2.* Ognari av einum ella fleiri handhavapartabrøvum kann ikki útinna tey rættindi, sum ein kapitaleigari hevur, uttan so at ognarin hevur givið fráboðan til felagið um sín ognarhald.
*Stk. 3.* Ognari av einum ella fleiri handhavapartabrøvum kann ikki útinna tey rættindi, sum ein kapitaleigari hevur, uttan so at ognarin er skrásettur í kt-skipan Skráseting Føroya, sbr. § 57 a ella § 58, ella
*Stk. 4.* Høvuðsleiðslan hevur ábyrgdina av at hava eftirlit við, um ein ognari lýkur treytirnar í stk. 1 – 4."

**3.** Í § 319, stk. 1 verður aftan á "§ 44, stk. 1," sett: "49, stk. 4,".

**§ 2**

Í løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016 um broyting í løgtingslóg um parta- og

smápartafeløg, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 1, nr. 14 verður "at ársfrasøgn kapitalfelagsins ikki verður grannskoðað" broytt til: "at ársfrásøgn kapitalfelagsins ikki skal verða grannskoðað".

2. Í § 1, nr. 34 verður í § 57 a, stk. 1 "sbr. § 48, stk. 2, 3. pkt.," strikað.

3. Í § 1, nr. 34 verður § 57 a, stk. 4 orðað soleiðis:
"*Stk. 4.* Skyldan at skráseta eftir stk. 1 og 3 er ikki galdandi, um tey handhavapartabrøv, sum eru ávikavist ognað og avhendað, eru tikin upp til handils á einum reguleraðum marknaði."

4. Í § 1, nr. 49 verður "pkt. 3" broytt til: "3. pkt".

5. Í § 1, nr. 51 verður "grannskoðað ársfrásøgn" broytt til: "grannskoðaða ársfrásøgnin".

6. Í § 1, nr. 57 verður "móðurfelagið" broytt til: "móðurfelagnum" og "móðurfyritøkan" broytt til: "móðurfyritøkuni".

7. Í § 1, nr. 65 verður "stk. 1" broytt til: "stk. 2".

8. Í § 1, nr. 105 verður "partabrøv" broytt til: "partabrøvum".

9. § 1, nr. 118 verður orðað soleiðis: "Í § 246, stk. 3 og § 247, stk. 2 verður "samanleggingarætlanini" broytt til: upplýsingum um ætlaðu samanleggingina, heruppií eina møguliga samanleggingarætlan".

10. § 1, nr. 145 verður orðað soleiðis: "Í § 265, stk. 2 verður "kloyvingarætlanini" broytt til: "upplýsingum um ætlaðu kloyvingina, heruppií eina møguliga kloyvingarætlan".

11. Í § 1, nr. 154 verður "§ 276, stk. 1, 2. pkt." broytt til: "§ 276, stk. 1, 3. pkt." og "ein metingarfrágreiðing" verður tvær staðni broytt til: "eina metingarfrágreiðing".

12. § 1, nr. 158 verður orðað soleiðis: "Í § 279, stk. 1 verður "har umskapanarætlanin verður greinað og grundað" broytt til: "har greitt verður frá og gundgivið fyri umskapanini, heruppií eini møguligari umskapanarætlan, sbr. tó stk. 2." "

**§ 3**

Í anordning nr. 1114 af 20. september 2007 om ikrafttræden af lov om visse erhvervsdrivende virksomheder (Vinnufyritøkulógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008, løgtingslóg nr. 52 frá 11. mai 2009, løgtingslóg nr. 69 frá 27. mai 2011, løgtingslóg nr. 25 frá 16. mars 2012 og løgtingslóg nr. 43 frá 6. mai 2016, verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 2, stk. 3, 1. pkt. verður orðað soleiðis:
"Undantikið reglurnar í kapitli 1, 2 og 7 og § 15 f, verður hendan lógin ikki nýtt upp á einstaklingafyritøkur, íognarfeløg og kommanditfeløg."

2. Aftan á § 15 e, men áðrenn yvirskriftina yvir § 16, verður sett:

"**§ 15 f.** Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at §§ 55, 56 og 58 í vinnufelagalógini við neyðugum tillagingum skulu verða nýttar upp á eitt ella fleiri sløg av fyritøkum, sum eru fevndar av hesi lóg."

**§ 4**

Henda løgtingslóg kemur í gildi tann 1. januar 2020.
*Stk. 2.* § 49, stk. 3, verður sett í gildi við kunngerð frá landsstýrismanninum.
*Stk. 3.* Feløg, sum áðrenn ígildiskomu lógarinnar hava samtykt heimildir sbrt. § 155, stk. 1 og 2 í vinnufelagalógini, sum innihalda møguleika at geva út handhavapartabrøv, kunnu nýta hesar heimildir fram til 1. januar 2021.
*Stk. 4.* Handhavapartabrøv, sum eru givin út eftir § 48, stk. 2, 3. pkt. eftir higartil galdandi vinnufelagalóg, ella sum verða givin út eftir heimildum, nevndar í stk. 2, kunnu framvegis vera nýtt eftir, at lógin er komin í gildi.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsøkir til uppskotið

Global Forum on Transparency and Exchange of Information hevur eftirlit við, at viðkomandi løgdømi eftir áheitan lata skattaupplýsingar eftir globalt viðurkendum standardum. Global Forum skal gera eina sonevnda "peer review" (ummæli/meting) av Føroyum seinni í vár ella í heyst. Í hesum sambandinum er víst á, at reglurnar um handahavapartabrøv eru óhepnar, tí við handahavapartabrævinum kann eigarin halda seg duldan, og reglurnar kunnu tí verða misnýttar til skattaundandrátt. Reglurnar um handhavapartabrøv eru tí ein avbjóðing í mun til teir standardir, sum OECD mælir til.

Lógaruppskotið fremur tilmæli OECD viðvíkjandi handhavapartabrøvum. Harumframt verður arbeitt við lógaruppskotið um veruligar eigarar í føroyskum fyritøkum, sum skal fremja tilmælini hjá FATF (Financial Action Task Force), sum er ein millumtjóða stovnur, hvørs endamál er at stríðast móti hvítvaski og fígging av yvirgangi, og at gera nýggja hvítvasklóg á yvirtiknum økjum.

### 1.2. Galdandi lóggáva

*1.2.1. Vinnufelagalógin*

Eftir § 48, stk. 2 í løgtingslóg nr. løgtingslóg nr. 73 frá 31. mai 2011 um parta- og smápartafeløg (vinnufelagalógin), kunnu kapitalpartar gevast út við navni. Partabrøv kunnu eisini verða givin út til handhava.

Upplýsingar um navnakapitalpartar, sum verða givnir út við navni, skulu eftir galdandi reglum síggjast í eigarabók felagsins, sum ein samlaður listi yvir allar persónar, sum hava partabrøv ella smápartar í felagnum.

Tað er bert í partafeløgum, at handhavapartabrøv kunnu verða givin út. Tey hava sum eyðkenni, at tað at hava partabrævið í sær sjálvum er nóg góð heimild fyri eigaraviðurskiftunum. Við handhavapartabrøvum fær partaeigarin sostatt møguleika at vera duldur eisini mótvegis felagnum.

Møguleikin at vera duldur er tó bert galdandi til eitt ávíst mark við tað, at ásetingin í § 58 í vinnufelagalógini um eina almenna eigaraskrá merkir, at allir kapitaleigarar, sum eiga í minsta lagi 5% av atkvøðurættinum ella í minsta lagi av 5 % av felagskapitalinum, skulu skrásetast í eigaraskránni, sum verður alment atkomulig. Hetta er galdandi bæði fyri navnakapitalpartar ella handhavakapitalpartar. Eftir § 55 stk. 3 í vinnufelagalógini kunnu verða ásettar reglur um, at partaeigarar í børsskrásettum feløgum eru undantiknir skrásetingarskylduni í sama mun sum eftir virðisbrævahandilslógini. Tó skal altið skrásetast um markið upp á 100% er rokki ella ikki longur er rokkið.

Eftir § 57 a í vinnufelagalógini skulu eigarar av handhavapartabrøvum, sum eru minni enn 5% av atkvøðurættinum hjá felagskapitalinum ella minni enn 5 prosent av felagskapitalinum, harumframt skrásetast í einum afturlatnum parti í eigaraskránni (handhavaskráin). Í hesa skrá er ikki almenn atgongd, men atgongd hjá skattamyndugleikum og øðrum myndugleikum, sum kunnu vísa á serligan áhuga í at fáa atgongd. Eigarar av handhavapartabrøvum undir 5 prosent í feløgum, sum eru børsskrásett, hava ikki skrásetingarskyldu.

Sambært galdandi reglum er manglandi skráseting revsisanksjonerað, t.v.s. at viðurskiftini kunnu meldast til politiið, og manglandi skráseting kann í síðsta enda hava við sær, at viðkomandi verður revsaður við bót. Eftir galdandi reglum hevur manglandi skráseting hinvegin ongan týdning fyri, um viðkomandi hevur rætt at útinna tey fyrisitingarligu og fíggjarligu rættindini, sum eru knútt at kapitalpørtunum.

### *1.2.2. Vinnufyritøkulógin*
Lóggávan viðvíkandi føroykum vinnufyritøkum byggir á ta grundleggjandi fortreyt, at tað skal vera opinleiki um viðurskifti felagsins. Tað snýr seg bæði um skrásettu upplýsingarnar um felagsins leiðslu, men eisini m.a. um roknskapirnir hjá feløgunum

Tað er eitt týðandi amboð í stríðnum móti skattaundandrátti, snýti og hvítvasking, at tað verður skaptur størri opinleiki um eigaraviðursskiftini í vinnufyritøkunum.

Eftir galdandi reglum er tað bert eigaraupplýsingar um partafeløg, partnarafeløg og smápartafeløg, undir hesum íverksetarafeløg, sum skulu skrásetast í almennu eigaraskránni. Tað er ikki krav um skráseting, tá tað snýr seg um eigararnar (kommandittistarnar) í einum kommandittfelag ella í øðrum vinnufeløgum við avmarkaðari ábyrgd, fevnd av vinnufyritøkulógini (anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om visse erhvervsdrivende virksomheder), undir hesum t.d. lutafelag við avmakaðari ábyrgd.

## 1.3. Endamálið við uppskotinum
Tað er av stórum týdningi, at tað er stórt álit á leiðsluna av og fíggjarviðurskiftini hjá føroyskum fyritøkum, sum krevur at tað er eitt gott og munagott eftirlit við og opinleika um viðurskiftini hjá fyritøkunum. Tað kunnu vera nøkur fá, sum royna at misnýta og ganga uttan um reglurnar fyri at fremja skattaundandrátt og onnur fíggjarlig brotsverk.

Dyljan av eigaraskapi hjá persónum og feløgum kann vera ein av fortreytunum fyri at kunna goyma pengar í skattaskjóli. Gjøgnumskygni er tí eitt týðandi amboð at tryggja, at fyritøkurnar ikki vera misnýttar til skattaundandrátt. Tørvur er tí á, at tað verður størri opinleiki um eigaraviðurskiftini í føroyskum fyritøkum

Endamálið við uppskotinum er at seta í verk tiltøk fyri at fyrbyrgja at vinnufelagalóggávvan verður misnýtt til skattaskjól og skattaundandrátt.

## 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

### *1.4.1. broytingar í vinnufelagalógini*
Skotið verður upp, at tað frá 1. januar 2020 ikki skal vera møguligt at geva út nýggjar kapitalpartar, sum verða givnir út til handhavan. Hetta skal eisini verða galdandi fyri verandi vinnufeløg, sum hava givið út handhavapartabrøv eftir galdandi reglum. Bakstøðið er, at handhavapartabrøv geva partaeigaranum møguleika fyri at vera ónevndur, t.d. mótvegis felagnum og almennum myndugleikum, sum kann verða misbrúkt til at dylja eigaraskap og við tí til skattaundandrátt.

Fleiri ES- lond hava strikað handhavapartabrøv ella hava á annan hátt regulerað hesi soleiðis, at gjøgnumskygni verður tryggjað. Í hesum sambandinum kann verða nevnt, at handhavapartabrøv ikki kunnu verða givin út í hinum norðurlondunum.

Samstundis verður skotið upp at áseta skyldu til, at ognari av óskrásettum handhavapartabrøvum (partabrøv, sum ikki eru børsnoterað), í feløgum, sum hava partabrøv upptikin til handils á reguleraðum marknaði, skal lata seg skráseta í afturlatna partinum í almennu eigaraskránni (handhavaskránni).

Eisini verður skotið upp at áseta herdar reglur fyri vantandi skráseting í almennu eigaraskránni. Handhavapartaeigari, sum ikki er skrásettur, skal missa fyrisitingarligu rættindini, undir hesum rættin til at møta og atkvøða á aðalfundi og fíggjarligu heimildirnar, tað vil siga rættin til m.a. at fáa útgoldið vinningsbýti. Hetta skal vera galdandi, tá talan er um partaeigara við skrásetingarskyldugum handhavapartabrøvum sambært § 57 a í vinnufelagalógini, sum telja undir 5 prosent av atkvøðunum ella kapitalinum, og sum tí skulu vera skrásett í handhavaskránni (afturlatna partinum í almennu eigaraskránni). Sama skal vera galdandi, um talan er um ognarar við handhavapartabrøvum upp á 5 prosent ella meiri, sum skulu vera skrásettir í almennu eigaraskránni, sbr. § 58 í vinnufelagalógini.

Eigaraskráin eftir § 57 a og § 58 er ikki gørd enn, og §§ 57 a og § 58 eru tí ikki settar í gildi, men verða settar í gildi við kunngerð, tá kt- skipanin hjá Skráseting Føroya, sum helst verður ment saman við Talgildu Føroyum, er klár. Nær ein slík skipan verður klár er trupult at siga í verandi løtu, men talan er helst um 1-2 ár. Tí er í ígildsikomuásetingini í § 4, stk. 2 í uppskotinum ásett, at kravið um skráseting eftir § 57 a og § 58 ikki verður sett í gildi nú, men verður sett í gildi við kunngerð frá landsstýrismanninum, tá tað í kt- skipan Skráseting Føroya er ment ein skrá at taka ímóti og skráseta eftir § 57 a og § 58 í vinnufelagalógini. Víst verður til viðmerkingarnar niðanfyri undir pkt. 1.5. og til § 4 í uppskotinum og serligu viðmerkingarnar til ásetingina.

*1.4.2. Broytingar í vinnufyritøkulógini*

Skotið verður upp at útvega heimild til, at kommandittfeløg og aðrar fyritøkur, sum verða reguleraðar eftir vinnufyritøkulógini, kunnu verða fevndar av almennu eigaraskránni. Tað skal tryggja almenning um eigaraviðurskiftini í hesum fyritøkunum, sum í dag ikki hava skyldu at almannakunngera upplýsingar um hetta.

*1.4.3. Tøkniligar rættingar*

Vinnufelagalógin varð seinast broytt við løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016 um broyting í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (Vinnufelagslógin). Lógartænastan Løgmanskrivstovuni hevur víst á, at í nøkrum førum samsvaraði teksturin í upprunalógini og í broytingarlógini ikki, og í hesum førum eru ásetingarnar í upprunalógini og broytingarlógini tí ikki samanskrivaðar í www.logir.fo.

Tí verða í hesum uppskotinum eftir tilmæli frá Lógartænastuni gjørdar nakrar tøkniligar rættingar í løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016. Hesar broytingarnar hava ikki innihaldsligan týdning.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**

Uppskotið var sent til ummælis hjá: Føroya Arbeiðsgevarafelag, Felagið Peningastovnar, Tryggingareftirlitið, Fíggjarmálaráðið, TAKS, Skráseting Føroya. Felagið fyri føroyskar advokatar. Felagið Føroyskir Grannskoðarar.

Ummælissvar kom frá:
Føroya Arbeiðsgevarafelag, Tryggingareftirlitinum og Fíggjarmálaráðinum, sum ikki høvdu viðmerkingar til uppskotið. Eisini komu viðmerkingar frá Skráseting Føroya, sbr. niðanfyri.

Sambært uppskotinum skal lógaruppskotið koma í gildi 1. januar 2020. Sambært § 1, nr. 2 í uppskotinum (Nýggj stk. 2 -4 í § 49 í lógini) í uppskotinum kann ein ognari av einum ella fleiri handhavapartabrøvum ikki útinna tey rættindi, sum ein kapitaleigari hevur, uttan so at ognarin er skrásettur í kt-skipan Skráseting Føroya, sbr. § 57 a ella § 58, ella hevur givið fráboðan til felagið um sítt§ 1, nr. 2 í ognarhald sbrt. § 55.

Skráseting Føroya hevur víst á, at eigaraskráin eftir § 57 a og § 58 er ikki gjørd enn, og §§ 57 a og § 58 eru tí ikki settar í gildi enn, men verða settar í gildi við kunngerð, tá kt- skipanin hjá Skráseting Føroya, sum helst verður ment saman við Talgildu Føroyum, er klár. Nær ein slík skipan verður klár er trupult at siga í verandi løtu, men talan er helst um 1-2 ár.

Sostatt ber ikki til, sum er, hjá feløgunum at fráboða Skráseting Føroya um ognarskap av handhavapartabrøvum eftir § 57 ella § 58 í vinnfelagalógini. Í ígildiskomuásetingini í § 3 í uppskotinum er tí ásett, at kravið um fráboðan til eigaraskránna um ognan av handavprtabrøvum fyri ikki at missa rættindi, ikki verður sett í gildi nú. Tað verður eftir uppskotinum sett í gildi við kunngerð frá landsstýrismanninum, tá kt- skipan Skráseting Føroya er ment til at taka ímóti skrásetingum í slíkari skrá.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið um at eisini eigarir í øðrum fyritøkur enn kapitalfeløg skulu skrásetast í almennu eigaraskoránni hevur við sær, at kt- skipa Føroya skal tillagast. Endaligir kostnaðir av hesum valdast hvørjar fyritøkur verða fevndar, sum verður ásett í kunngerð. Kunngerðin verður ikki sett í gildi fyrr enn eigarskráin eftir § 57 a og § 58 er gjørd.

Sum nevnt hevur Skráseting Føroya hevur víst á, at eigaraskráin eftir § 57 a og § 58 er ikki gørd enn, og §§ 57 a og § 58 eru tí ikki settar í gildi enn, men verða settar í gildi við kunngerð, tá kt- skipanin hjá Skráseting Føroya, sum helst verður ment saman við Talgildu Føroyum, er klár. Nær ein slík skipan verður klár er trupult at siga í verandi løtu, men talan er helst um 1-2 ár. Sbr. viðmerkingarnar undir pkt. 1.5., § 4 viðmerkingarnar til ásetingina.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri land ella kommunur.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Skotið er upp, at eigari av handhavapartabrøvum ikki hevur fyrisitingarligar ella fíggjarligar heimildir uttan so, at viðkomandi eftir § 57 a ella § 58 hevur skrásett seg í eigaraskránni í kt-skipan Skráseting Føroya. Hetta hevur hevur við sær umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna við tað, at feløgini eftir § 1, nr. 2 í uppskotinum (nýggj § 49, stk. 4) skulu hava eftirlit við, at ognari lýkur krøvini at útinna fyrisitingarligar ella fíggjarligar heimildir. Kravið um skráseting av handhavapartabrøvum verður tó ikki sett í gildi nú, sbr. viðmerkingarnar omanfyri undir pkt. 1.5 og serligu viðmerkingarnar til § 4.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvi

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvi.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Uppskotið hevur ikki týdning fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Uppskotið hevur ikki týdning fyri tvørgangaandi millumtjóðasáttmálar.

### 2.9. Markaforðingar

Uppskotið innheldur ikki markaforðingar.

### 2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv

Høvuðsleiðslan í einum partafelag (vanliga nevndin) kann verða revsa við bót, um brot verður framt á § 49, stk. 4, sbr. § 1, nr. 2 og nr. 3 í uppskotinum.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið innheldur ikki ásetinggar um skattir.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið innheldur ikki ásetinggar um skattir.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?**
Høvuðsleiðslan í einum partafelag (vanliga nevndin) er áløgd skyldur eftir § § 49, stk. 4, sbr. § 1, nr. 2 í uppskotinum.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?**
Lógaruppskotið leggur heimildir til landsstýrismannin.

**2.15. Gevur uppskotið atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

### Til § 1

***Til nr. 1***
Broytingin, sum skotin er upp, hevur við sær, at frá tí at lógin er komin í gildi 1. januar 2020 verður ikki longur møguligt geva út handhavapartabrøv. Partabrøv kunnu sostatt eins og smápartar bert gevast út við navni. Fyri verandi handhavapartabrøv verða sett fleiri krøv til, nær fíggjarligu og fyrisitingarligu rættindini, sum eru knýtt at partabrøvunum, kunnu verða nýtt, sbr. § 1, nr. 2 í uppskotinum um broyting av § 49 í vinnufelagalógini og viðmerkingarnar til ásetingina.

Broytta ásetingin hevur eisini við sær, at tað ikki í verandi vinnufeløgum, sum hava givið út hanhavapartabrøv eftir galdandi reglum, kunnu verða givin út nýggj handhava partabrøv.

Broytingin verður skotin upp, tí handhavapartabrøv hava tann eginleika, at handhavin kann vera ónevndur, t.d. í mun til felagið og almennar myndugleikar. Tí hevur m.a. OECD víst á, at handhavapartabrøv kunnu brúkast til at dylja eigaraskapin og við tí til skattaundadrátt. OECD hevur tískil mælt til, at handahavapartabrøv annaðhvørt verða tikin av ella at partaeigarar, sum ikki geva seg til kennar, missa síni rættindi. Við støði í hesum verður skotið upp, at handhavapartabrøv verða tikin av. Skotið verður eisini upp í § 1, nr. 2, at manglandi skráseting hevur við sær tap av rættindum.

Útgivin, men ikki brúkt, ubýtilig og warrants verða mett sum teknað, og partabrøvini, sum liggja undir hesum, verða sostatt eisini mett sum teknað, um tey seinni verða brúkt. Nevndu konvertiblu skuldarbrøv og warrants kunnu sostatt framvegis brúkast, tá lógin er komin í gildi.

Um eitt felag ætlar at broyta handhavapartabrøv til navnapartabrøv kann viðtøkubroytingin samtykkjast við vanligum viðtøkumeiriluta, sbr. § 106 í vinnufelagalógini.

Fyri verandi handhavapartabrøv verður skotin upp ein skiftisskipan, sbr. § 3, stk. 3 í uppskotinum. Skiftisskipanin hevur við sær, at verandi handhavapartabrøv, sum eru útgivin, áðrenn hetta lógaruppskotið fær gildi, kunnu halda fram. Í uppskotnu § 3, stk. 2 er ein skiftisregla fyri verandi heimildir at útgeva handhavapartabrøv. Víst verður til § 3, stk. 2 og 3 og viðmerkingarnar til nevndu greinar.

***Til nr. 2***
Broytingin, sum skotin er upp at gera í § 49 í vinnufelagalógini, nýggj stk. 2-4, hevur við sær krav um skráseting í kt-skipan Skráseting Føroya, um partaeigari við handhavapartabrøvum ynskir at brúka fyrisitingarligu rættindi síni, undir hesum rættin til at møta og atkvøða á aðalfundinum, og tær fíggjarligar heimildirnar, tvs. rættin til m.a. at fáa útgoldið vinningsbýti og rættin til nýggjar kapitalpartar við kapitalhækkan.

Herdu reglurnar galda bæði, um talan er um partaeigara við handhavapartabrøvum, sum telja undir 5 prosent av atkvøðunum ella kapitalinum, og sum tí møguliga skal vera skrásettur í handhavaskránni (lokaða partinum í almennu eigaraskránni), sbr. § 57 a í vinnufelagalógini, og tá talan er um partaeigara við handhavapartabrøvum á 5 prosent ella meira, sum sostatt skal vera skrásettur í almennu eigaraskránni, sbr. § 58 í vinnufelagalógini. Tá skyldan at skráseta

ogn handhavapartaeigaranna upp á 5 prosent ella meira liggur hjá felagnum og ikki hjá partaeigaranum, er herumframt skotið upp, at fráboðan eftir § 55 í vinnufelagalógini eisini hevur við sær, at partaeigari kann brúka síni rættindi. Tá ið felagið gjøgnum eina fráboðan eftir § 55 í vinnufelagalógini er vorðið kunnugt við, at ein eigari situr við einum ella fleiri handhavapartabrøvum, sum telja 5 prosent ella meira av atkvøðunum ella kapitalinum í felagnum, so kann felagið ikki lata sum einki og lata tað ganga útyvir partaeigaran við atliti til at kunna brúka síni rættindi sum partaeigari.

Í tí føri talan er um ein ognara av handhavapartabrøvum, handlað á einum reguleraðum marknaði, og viðkomandi ognari eigur minni enn 5 prosent av atkvøðunum ella kapitalinum, eru fyrisitingarligu og fíggjarligu heimildirnar hjá viðkomandi tó ikki treytaðar av, at viðkomandi er skrásettur í kt-skipan Skráseting Føroya, sbr. § 57, stk. 4, sum skotið er upp at broyta sum liður í hesum lógaruppskoti.

Sambært uppskotnu § 49, stk. 4 í vinnufelagalógini, skal einstaka felagið kanna, at ognari av einum ella fleiri kapitalpørtum lýkur treytirnar í stk. 1 -3. Uppskotna ásetingin hevur við sær, at høvuðsleiðslan í felagnum hevur ábyrgdina av at tryggja, at treytirnar, í mun til nýtslu av rættindum kapitaleigarans, eru loknar.

Uppskotið um at høvuðsleiðslan hevur skyldu at tryggja, at treytirnar í § 49, stk. 1 - 3 í vinnufelagalógini vera loknar, hevur ikki við sær, at eftirlit skal fremjast, um kapitaleigari í aðrar mátar er rætt skrásettur í røttu viðkomandi skráum.

Skyldan eftir stk. 1 er ein kodifisering av galdandi siðvenju, har higartil hevur verið hildið, at eitt felag skal hava eftirlit við, um ein ognari hevur rætt til at útinna fyrisitingarlig rættindi, t.d. við atkvøðugreiðslu á aðalfundi hjá felagnum.

Í mun til eftransan av krøvunum í stk. 2 og stk. 3, so er hetta nýggjar ásetingar, sum er neyðugar, tá herd regla er skotin upp í sambandi við, at ognari av einum ella fleiri handhavapartabrøvum, fyri at kunna útinna rættindi síni, skal vera skrásettur í lokaða partinum í almennu eigaraskránni. Felagið skal kanna hesi viðurskifti, áðrenn ein partaeigari kann útinna síni rættindi, sum t.d. at greiða atkvøðu á aðalfundi, ella fíggjarlig rættindi, sum t.d. útgjald av vinningsbýti. Mett verður, at feløgini higartil eisini hava havt eftirlit við handhavapartaeigarum, tá hesir skulu skjalprógva sín rætt til at útinna tey rættindi, sum eru knýtt at handhavapartabrøvunum gjøgnum ognarræðið av handhavapartabrævinum.

Tað er tann einstaki handhavapartaeigarin, ið hevur skyldu til at skjalprógva fyri felagnum, at viðkomandi er rætt skrásettur í mun til t.d. at nýta sín rætt á aðalfundi. Í sambandi við skráseting av handhavapartabrøvum í kt-skipan Skráseting Føroya fær partaeigarin eina kvittan, har tað sæst, hvørji viðurskifti eru skrásett í skránni. Skyldan hjá leiðsluni at kanna, hvørt handhavapartaeigari er rætt skrásettur, kann soleiðis uppfyllast við at kanna kvittan partaeigarans frá kt-skipan Skráseting Føroya.

Sum avleiðing av ásetingini í uppskotinum kann handhavapartaeigari møguliga missa fíggjarlig rættindi, ið kunnu hava við sær, at felagið ikki kann rinda vinningsbýti til partaeigaran. Vantandi skráseting av ognarskapinum til handhavapartabrøvini hava tó ikki við sær, at partaeigarin missir sítt vinningsbýti, men harafturímóti hevur felagið skyldu til at varðveita (deponera) vinningsbýtið eftir reglunum í deponeringslógini.

Skotið verður upp í § 1, nr. 3, at brot á § 49, stk. 4 í vinnufelagalógini verður revsiálagt.

***Til nr. 3***
Skotið verður upp, at § 49, stk. 4 í uppskotinum verður revisáløgd.

Broytingin í § 49, stk. 4 hevur við sær, at evsta høvuðsleiðsla skal hava eftirlit við/kanna, um kapitaleigari hevur rætt til at nýta síni fyrisitingarligu og fíggjarligu rættindi, og leiðsla felagsins kann verða revsað við bót, um loyvi verður givið kapitaleigara at fremja síni rættindi í stríð við ásetingina.

Brot á ásetingina í uppskotinum kann t.d. vera útgjald av vinningsbýti til ein handhavapartabrævaeigara hóast hesin/viðkomandi ikki lýkur treytirnar í § 49, stk. 1-3 í vinnufelagalógini. Um eigari/ognari visti ella átti at vitað, at viðkomandi ikki leyk treytirnar fyri at brúka síni rættindi sum kapitaleigari, kann felagið møguliga við heimild í vanligu endurgjaldsreglunum leggja mál fyri rættin um endurgjaldskrav móti viðkomandi.

**Til § 2**

***Til nr. 1***
Hetta er ein tøknilig broyting av § 1, nr. 14 í løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016 um broyting í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg.

Í § 1, nr. 14 í løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016 er ásett:
"Í § 27, stk. 1, nr. 4, verður "at ársfrásøgn kapitalfelagsins ikki verður grannskoðað" broytt til: "at kapitalfelagsins ársroknskapur o.a. ikki verður grannskoðaður".

Rætta orðingin í § 27, stk. 1, nr. 4 í upprunalógini er "at ársfrásøgn kapitalfelagsins ikki skal verða grannskoðað".

Ásetingin § 1, nr. 14 í løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016 verður við hesum uppskotinum broytt samsvarandi.

Uppskotið hevur ikki innihaldsligar broytingar við sær í mun til broytingina í § 1, nr. 14 í løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016.

**Til nr. 2**
Skotið verður upp at strika tilvísingina í § 57 a, stk. 1 til "§ 48, stk. 2, 3. pkt.", tí skotið er upp í § 1, nr. 1 í lógaruppskotinum at strika § 48, stk. 2, 3. pkt., sum higartil hevur givið heimild at útflýggja handhavapartabrøv. Broytingin er ein neyðug tillaging, sum fylgja av broytingini í § 1, nr. 1 í uppskotinum, og verður víst til hesa áseting og tilhoyrandi viðmerkingar.

***Til nr. 3***
Broytingin, sum skotin verður upp, hevur við sær, at feløg, sum einans hava partar av partabrøvum sínum upptikin til handils á einum reguleraðum marknaði, eru umfatað av skrásetingarskylduni, sbr.. stk. 1 og 3, fyri tann partin av partabrøvunum, sum ikki er upptikin til handils.

Verandi orðing í ásetingini undantekur heilt feløg, sum hava partabrøv upptikin til handils á einum reguleraðum marknaði hóast tað, at partar av felagnum eisini hava partabrøv, sum ikki eru upptikin til handils.

Broytingin skal setast í samband við, at umsitingarlig atlit hava ligið til grund fyri at undantaka handhavapartabrøv, upptikin til handils á einum reguleraðum marknaði, tí talan er um partafeløg, hvørs partabrøv oftari eru upptikin til handils, umframt at handilin fer fram á gjøgnumskygdum marknaðum. Undantøkan eigur tí bert at umfata handhavapartabrøv, sum eru upptikin til handils á einum reguleraðum marknaði.

***Til nr. 4***
Hetta er ein tøknilig broyting av § 1, nr. 49 í løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016 (broyting av § § 92, stk. 1 í vinnfelagalógini viðvíkjandi elektróniskum aðalfundi). Í staðin fyri "pkt. 3" verður sett: 3. pkt".

Uppskotið hevur ikki innihaldsligar broytingar við sær í mun til broytingina í 1, nr. 49 í løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016.

***Til nr. 5***
Hetta er ein tøknilig broyting av § 1, nr. 51 í løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016 (broyting av § 98.)

Í § 1, nr. 51 løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016 er ásett: "Í § 98 verður "grannskoðað ársfrásøgn" broytt til: "ársfrásøgnin".

Í § 98 í upprunalógini er orðingin "grannskoðaða ársfrásøgnin". § 1, nr. 51 í løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016 verður við hesum uppksotinum broytt samsvarandi.

Uppskotið hevur ikki innihaldsligar broytingar við sær í mun til broytingina í § 1, nr. 51 í løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016.

***Til nr. 6***
Hetta er ein tøknilig broyting av § 1, nr. 57 løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016 (broyting av § 134, 2. pkt).

Í § 1, nr. 57 í løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016 er ásett: "Í § 134, 2. pkt. verður "móðurfelagið" broytt til: "móðurfyritøkan".

Í § 134, 2. pkt í upprunalógini stendur "móðurfelagnum", og tað skal tí vera "móðurfelagnum", sum verður broytt til "móðurfyrtøkan", og verður § 1, nr. 57 í løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016 broytt samsvarandi.

Uppskotið hevur ikki innihaldsligar broytingar við sær í mun til broytingina í § 1, nr. 57 í løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016.

**Til nr. 7.**
Hetta er ein tøknilig broyting av § 1, nr. 65 í løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016 (broyting av § 134, 2. pkt).

Í § 1, nr. 65 í løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016 er ásett: "Í § 156, stk. 1, nr. 3 verður í staðin fyri "ársfrásøgn felagsins er fevnd av" sett: "felagsins ársroknskapur o.a. er fevndur av".
Tað skal vera § 156, stk. 2, og verður § 1, nr. 65 í løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016 broytt samsvarandi.

Uppskotið hevur ikki innihaldsligar broytingar við sær í mun til broytingina í § 1, nr. 65 í løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016.

***Til nr. 8***
Hetta er ein tøknilig broyting av § 1, nr. 105 í løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016 (broyting av § 237, stk. 3, nr. 6).

Í § 1, nr. 105 í løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016 er ásett: "Í § 237, stk. 3, nr. 6 verður "partabrøv" broytt til: "kapitalpartar".

Í 237, stk. 3, nr. 6 í upprunalógini stendur "partabrøvum", og tað skal tí vera "partabrøvum", sum verður broytt til "kapitalpartar", og verður § 1, nr. 105 í løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016 broytt samsvarandi.

Uppskotið hevur ikki innihaldsligar broytingar við sær í mun til broytingina í § 1, nr. 105 í løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016.

***Til nr. 9***
Hetta er ein tøknilig broyting av § 1, nr. 118 í løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016 (broyting av 246, stk. 3 og § 247, stk. 2).

Í § 1, nr. 118 í løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016 er ásett: "Í § 246, stk. 3 og § 247, stk. 2 verður "samanleggingarætlan" broytt til: "upplýsingar um ætlaðu samanleggingina, heruppií eina møguliga samanlegginarætlan".

Ásetingin í § 1, nr. 118 um at broyta § 246, stk. 3 og § 247, stk. 2 verður broytt soleiðis:

Í 246, stk. 3 og § 247, stk. 2 verður "samanleggingarætlanini" broytt til: "upplýsingum um ætlaðu samanleggingina, heruppií eina møguliga samanlegginarætlan".

Uppskotið hevur ikki innihaldsligar broytingar við sær í mun til broytingina í § 1, nr. 118 í løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016.

***Til nr. 10***
Hetta er ein tøknilig broyting av § 1, nr. 145 í løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016 (broyting av 265, stk. 2).

§ 1, nr. 145 er ásett: "Í § 265, stk. 2 verður "kloyvingarætlanin" broytt til: "Upplýsingum um ætlaðu kloyvingina, heruppií eina møguliga kloyvingarætlan".

Verður broytt til: "§ 1, nr. 145 verður orðað soleiðis: "Í § 265, stk. 2 verður "kloyvingarætlanini" broytt til: "upplýsingum um ætlaðu kloyvingina, heruppií eina møguliga kloyvingarætlan".

Uppskotið hevur ikki innihaldsligar broytingar við sær í mun til broytingina í § 1, nr. 145 í løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016.

***Til nr 11***
Hetta er ein tøknilig broyting av § 1, nr. 154 í løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016 (broyting av § 271, stk. 1, 2. pkt. og í 276, stk. 1, 2. pkt).

Í § 1, nr. 154 verður "§ 276, stk. 1, 2. pkt.“ broytt til: "§ 276, stk. 1, 3. pkt." og "ein metingarfrágreiðing" verður tvær staðnis broytt til: "eina metingarfrágreiðing".

Uppskotið hevur ikki innihaldsligar broytingar við sær í mun til broytingina í § 1, nr. 145 í løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016.

***Til nr. 12***
Hetta er ein tøknilig broyting av § 1, nr. 158 í løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016 (broyting av § 279, stk. 1

**Í** § 1, nr. 158 um er ásett. Í § 279, stk. 1 verður "har umskipanarætlanin verður greinað og grundað" broytt til: "har greitt verður frá og gundgivið fyri umskipanini, heruppií eini møguligari umskipanarætlan, sbr. tó stk. 2."

Verður broytt til:

"§ 1, nr. 158 verður orðað soleiðis: "Í § 279, stk. 1 verður "har umskapanarætlanin verður greinað og grundað" broytt til: "har greitt verður frá og gundgivið fyri umskapanini, heruppií eini møguligari umskapanarætlan, sbr. tó stk. 2."

Uppskotið hevur ikki innihaldsligar broytingar við sær í mun til broytingina í § 1, nr. 158 í løgtingslóg nr. 56 frá 6. mai 2016.

**Til § 3**

***Til nr. 1***
Talan er um eina fylgibroyting, sum fylgja av § 2, nr. 2 í lógaruppskotinum, ið setur inn eina nýggja § 15 f, um heimild til landsstýrismannin at áseta reglur um, at eigarar av einum ella fleiri sløgum av fyritøkum, fevndar av hesi lóg, skulu skrásetast í kt-skipan Skráseting Føroya.

Eftir galdandi vinnufyritøkulóg eru ikki allar reglurnar í lógini galdandi fyri allar fyritøkur, ið eru fevndar av lógini. Fyri at tryggja, at allar fyritøkur, fevndar av lógini, verða fevndar av heimildini í uppskotinum um, at eigarar av fyritøkuni skulu skrásetast í kt-skipan Skráseting Føroya, er skotið upp, at í § 2, stk. 3 verður sett inn tilvísing til nýggju § 15 f, sum hevur hesa heimild.

Við hesi broyting fara einstaklingafyritøkur, íognarfeløg og kommmanditfeløg uttan mun til, um hesi eru skrásetingarskyldug, at verða fevnd av ásetingini í § 2, nr. 2 í hesum uppskoti.

Ætlanin er, at einstaklingafyritøkur og íognarfeløg ikki í fyrstu atløgu skulu vera fevnd av kunngerðini, sum ætlanin er at seta í gildi, men at tað kann umhugast av nýggjum seinni, og er heimildin tí orðað sum galdandi fyri allar fyritøkur, fevndar av vinnufyritøkulógini.

Víst verður til § 2, nr. 2 og viðmerkingarnar til hesa.

**Til nr. 2**
Nýggja ásetingin í uppskotinum hevur við sær, at Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, og reglur um fráboðan og skráseting fyri vinnurekandi fyritøkur svarandi til tær reglur, sum eru galdandi í dag fyri kapitalfeløg, sbr. §§ 55, 56 og 58 í vinnufelagalógini.

Um reglur verða ásettar samsvarandi teimum í § 55 í vinnufelagalógini, hevur tað við sær, at eigarar skulu boða fyritøkuni frá, um teir hava ognarræði á 5 prosent ella meira av kapitalinum ella atkvøðunum í fyritøkuni. Sama er galdandi um farið verður um eina røð av nærri tilskilaðum markvirðum, hækkandi uppeftir og lækkandi niðureftir. Prosentvirðini í § 55 í vinnufelagalógini eru 5, 10, 15, 20, 25, 50, 90, 100, og harumframt 1/3 ella 2/3.

Fráboðanin sambært § 56 í vinnufelagalógini skal verða givin fyritøkuni í seinasta lagi 2 vikur aftaná at farið er um eitt av viðkomandi mørkum, ella hesi ikki longur eru rokkin.

Harumframt inniheldur ásetingin í vinnufelagalógini eisini krøv um eina røð av upplýsningum um m.a. navn, bústað og p- tal, sum eftir ætlan eisini verða sett í gildi fyri fyritøkur, fevndar av vinnufyritøkulógini.

Samsvarandi kunnu reglur verða ásettar, ið svara til § 58 í vinnufyritøkulógini um, at fyritøkur skjótast gjørligt skulu fráboða almennu eigaraskránni hjá Skráseting Føroya um omanfyri nevnda ognarræði.

Broytingarnar í uppskotinum skulu tryggja opinleika í kommanditfeløgum, íognarfeløgum, lutafeløgum og øðrum fyritøkum við avmarkaðari ábyrgd, svarandi til tað sum er galdandi fyri kapitalfeløg eftir í vinnufelagalógini.

Hetta hevur við sær størri gjøgnumskygni um eigaviðurskiftini í feløgunum, og harvið størri álit á feløgini. Tað kann viðvirka til at fremja íløgurnar í vinnulívið.

Skotið verður upp, at §§ 55, 56 og 58 bert kunnu verða nýttar við neyðugum tillagingum.

Í fyritøkum, fevndar av vinnufyritøkulógini, er ikki krav um minimumskapital og partabrøv kunnu ikki verða givin út og atkvøðast kann ikki eftir eigaraparti. Byrjanarstøðið í hesum fyritøkum er ofta, at luttakararnir atkvøða eftir aðalregluni “ein maður, ein atkvøða” ella eftir sanhandli ella avhending til felagið. Seinast nevndi atkvøðuháttur eyðkennir ofta lutafeløg.

Tá tað í byrjanarstøðu ikki er talan um atkvøðugreiðslu eftir kapitali í fyritøkum, ið eru fevndar av vinnufyritøkulógini, er neyðugt at tillaga kunngerðina, sum skal setast í gildi við heimild í ásetingini, sum skotin er upp. Kunngerðin skal tryggja, at reglur verða ásettar, so ávirkan, ið kann javnmetast við ávirkan upp á 5 prosent ella meira av atkvøðunum ella kapitalinum, skal fráboðast og skrásetast. Hetta byggir á eina ítøkiliga meting.

Heimildin, sum skotin er upp, at áseta reglur um fráboðan og skráseting fyri vinnurekandi fyritøkum svarandi til tær reglur, sum eru galdandi í dag fyri kapitalfeløg, sbr. §§ 55, 56 og 58 í vinnufelagalógini, skal í fyrstu atløgu bert verða nýtt til at skráseta eigarar í

kommanditfeløgum. Mett verður um áløgdu byrðuna, sum stendst av at nýta heimildina, tá kunngerðin verður send til hoyring.

Ítøkiliga nýtslan av heimildini, sum skotin er upp, hevur við sær, at tað bert verða almannakunngjørdar somu upplýsingar, sum almannkunngerast fyri feløg, sum í dag eru fevnd av almennu skránni.

Tá kunngerðin verður sett í gildi, skal tryggjast, at krav ikki verður um dupultskráseting av eigarum (legalum og veruligum).

Sostatt verða einans upplýsingar um navn og bústað hjá eigaranum almannkunngjørdir, og eisini upplýsinar um prosentvísu støddina (minst 5 prosent) av møguligum kapitali ella atkvøðurættindum í fyritøkuni.

Upplýsingar um persónligu skattaviðurskifti eigarans verða ikki almannakunngjørdar.

Umframt hetta verða upplýsingar um kapital og atkvøðurættindi almannakunngjørdar í prosentvísum markvirðum, sbr. omanfyri, og vera neyvar ognir, upphæddir ella atkvøðurættindi ikki almannakunngjørd.

Reglurnar í §§ 50- 54 í vinnufelagalógini verða við neyðugum tillagingum nýttar upp á fyritøkur, sum eru fevndar av hesi lóg. Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um eigarabókina”

Tann 30.01.19 vóru 19 feløg, fevnd av vinnufyritøkulógini, skrásett hjá Skráseting Føroya.

**Til § 4**

*Stk. 1*

Skotið verður upp í stk.1, at lógin fær gildi 1. januar 2020. Hetta hevur við sær, at frá tí at lógin fær gildi, ber ikki longur til at geva út handhavapartabrøv í nýggjum feløgum ella í verandi feløgum, undir hesum feløgum, sum longu hava givið út handhavapartabrøv sambært galdandi reglum.

Ásetingin hevur harumframt við sær, at handhavapartabrøv ikki kunnu gevast út gjøgnum fondshækkan.

*Stk. 2*

Sambært uppskotinum skal lógaruppskotið koma í gildi 1. januar 2020. Sambært § 49, stk. 2 og stk. 3 í uppskotinum kann ein ognari av einum ella fleiri handhavapartabrøvum ikki útinna tey rættindi, sum ein kapitaleigari hevur, uttan so at ognarin er skrásettur í kt-skipan Skráseting Føroya, sbr. § 57 a ella § 58, ella hevur givið fráboðan til felagið um sítt ognarhald sbrt. § 55.

Eigaraskráin eftir § 57 a og § 58 er ikki gørd enn, og §§ 57 a og § 58 eru tí ikki settar í gildi enn, men verða settar í gildi við kunngerð, tá kt- skipanin hjá Skráseting Føroya, sum helst verður ment saman við Talgildu Føroyum, er klár. Nær ein slík skipan verður klár er trupult at siga í verandi løtu, men talan er helst um 1-2 ár.

Sostatt ber ikki til, sum er, hjá feløgunum at fráboða Skráseting Føroya um ognarskap av handhavapartabrøvum eftir § 57 ella § 58 í vinnfelagalógini.

Skotið verður tí upp, at ásetingin í § 1, nr. 2 í (§ 49, stk. 3) í uppskotimum um fráboðan til eigaraskránna eftir § 57 a og § 58 ikki verður sett í gildi nú, men verður sett  í gildi við kunngerð frá landsstýrismanninum, tá eigaraskráin er ment í kt- skipan Skráseting Føroya.

Ognarar av partabrøvum, undir hesum ognarar av handhavapartabrøvum, skulu tó fráboða til felagið um sítt ognarhald sbrt. § 55 fyri ikki at missa rættindi eftir § 49, stk. 2 í uppskotinum.

*Stk. 3*

Sambært stk. 3 í uppskotinum kunnu feløg, sum frammanundan at lógin fær gildi, hava samtykt heimildir sambært § 155, stk. 1 og 2 í vinnufelagalógini, sum innihhalda møguleika at geva út handhavapartabrøv, nýta hesar heimildir eftir innihaldinum í heimildunum, fram til 1. januar 2021

Við atliti at verandi feløgum, har aðalfundurin hevur givið høvuðsleiðsluni heimild til at hækka felagskapitalin, og hetta kann verða gjørt við útlutan av handhavapartabrøvum, er neyðugt, at felagið í upp í eitt ár eftir, at lógin er sett í gildi, kann nýta tílíkar heimildir. Hetta gevur møguleika fyri, at feløgini í hesum tíðarskeiði fáa stundir at seta neyðug tiltøk í verk í sambandi við lógarbroytingarnar, uttan at skula halda eykaaðalfund. Samsvarandi er galdandi fyri heimilan at geva út umbýtilig skuldarbrøv og warrants.

*Stk. 4*

Sambært stk. 4 í uppskotinum kunnu handhavapartabrøv, sum eru givin út áðrenn hetta lógaruppskot verður sett í gildi, halda fram eftir, at lógin er sett í gildi. Ásetingin er ein skiftisáseting fyri verandi handhavapartabrøv við tað, at tey eru givin út sambært § 48, stk. 2, 3. pkt. í galdandi vinnufelagalóg, sum skotið er upp at strika, sbr. § 1, nr. 1 í lógaruppskotinum. Ásetingin er eisini galdandi fyri handhavapartabrøv, sum verða givin út sambært heimilan til nevndina, sbr. stk. 2.

Uppskotna broytingin hevur ikki avleiðingar fyri longu útgivin, men enn ikki nýtt, umbýtilig skuldarbrøv og warrants. Umbýtilig skuldarbrøv og warrants eru eyðkend sum rættindi, men ikki skyldur, at útvega kapitalpartar seinni. Hesi tekningarrættindi eru at rokna sum givin, tá avgerðin varð tikin, og undirliggjandi partabrøv verða soleiðis eisini roknað sum teknaði tá, um rættindini nýtt seinni. Nýtsla av tílíkum rættindum kann eisini fara fram eftir, at lógin er sett í gildi.

Um eitt felag, áðrenn dagfestingina, tá lógin kom í gildi, hevur samtykt at geva út handhavapartabrøv, men tekningartíðarskeiðið gongur út eftir hesa dagfesting, vil kann útgáva av handhavapartabrøvum fremjast sum ætlað. Tað er dagfestingin, tá tað varð samtykt, sum er avgerandi.

Avtøka av § 48, stk. 2, 3 pkt. í galdandi vinnufelagalóg ávirkar soleiðis bert útgávu av nýggjum handhavapartabrøvum. Avtøkan hevur við sær, at tað, eftir at lógaruppskotið er sett í gildi, hvørki kunnu verða givin út handhavapartabrøv í nýggjum feløgum ella í verandi feløgum. Tað merkir til dømis, at tað ikki við kapitalhækkan kunnu gevast út nýggj handhavapartabrøv til partaeigarar, ið longu hava tílík partabrøv. Frameftir kunnu bert verða givin út navnapartabrøv, sbr. tó viðmerkingarnar til stk. 2 í uppskotinum.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, 5. mars 2019

**Poul Michelsen**
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Hoyringarsvar frá Føroya Arbeiðsgevarafelag
Fylgiskjal 3: Hoyringarsvar frá Tryggingareftirlitinum
Fylgiskjal 4: Hoyringarsvar frá Fíggjarmálaráðnum
Fylgiskjal 5: Hoyringarsvar frá Skráseting Føroya